

*Hesar dunnurnar á Trøllanesi ræðast ikki motorsúkklur*



*Ove Ritter, ímillum konu sína (vm) og sín danska gest, skipaði fyri MC-Boogie-hugtakinum longu í 1998*



*Vertshjúnini á Trøllanesi, Anja og Eyðun Eliasen*

rundkoyringina oman fyri Skipanes. Gjøgnum triðja tunnilin, Leirvíkartunnilin og haðani til Norðoyatunnilin. Gjøgnum tann listprýdda undirsjóvartunnilin til ferjuleguna hjá Sam. Saman við einum tveimum-trimum bilum standa 48 motorsúkklur sum einki á dekkinum á Sam. Hóast illfýsið er í veðrinum, kemur ikki ein dropið inn á akdekkið á Sam, tí góða, gamla, alroynda veteraninum úr tí forna Vestmannasundi, tá ið Sam-samband var millum Vestmanna og Oyragjógv.

Hugaligt er at leggja at við ta rættiliga nýggju ferjuleguna á Syðradali á Kalsoynni. Fyrst eftir nýgjørdum vegi, síðan gjøgnum Húsar og tann fyrsta tunnilin í oynni, sum á sinni í skemti varð rópt “Blokkfloytan”, tunnilsheitið fyri Kalsoynna. Fyrsti tunnil er eitt sindur langur, annar og triði eru munandi stytri, og tann fjórði er bæði drúgvur og turrur. Samanumtikið fýra tunlar í heilt toliliga góðum standi. Teir eru góðir at koyra ígjøgnum, og tryggir eisini sum skilst.

Henda dagin koyrdu MC’ararnir aftur og fram gjøgnum sjey tunlar.

Komin til Trøllanes tóku Anja og Eyðun ímóti. Tey flestu – ivaleyst øll – MC-fólkini mundu mist ondina, tí nú vóru tey í einari av teimum tiltiknu vøkru Norðoyggjunum, og seinni í Mikladali mundi onkur hugsa, at “har standa húsini hjá Amariel (Norðoy)” og skilja, hví tær høgu, ófatiliga vøkru oyggjarnar fyri norðan eru eitt av yndismotivunum hjá okkara eins og fremmandum listafólkum.

Nógvur vindur var henda dagin. Ja, hann øtlaði veðrið. Ein fór við kakaobikari og papptallerki við bolla við súltutoyi og vaflum við súltutoyi og róma ímillum úr kjallaranum hjá Anju og Eyðuni at skriva í gestabókina, sum lá fyri akkeri á lokinum á einum ruskílati. Ein hvirla tók vafluna og bollan og bikarið og sletti súltutoy og róma á veðurleikmannin og kakao á brillugløsini. Ja, ja. Anja var skjót við einum heitum lappa at turka burtur av aftur við. No problem!

Alt gekk væl. Hevði veðrið verið betri, høvdu tey borðreitt úti. So var ikki, men hondina á hjartað ... tað gjørdi einki. Hetta var fantastiskt.

Aftur gjøgnum allar tunlarnar. Aftur av Trøllanesi til Mikladals og Húsar til Syðradals. Ikki ein dropi inn á dekkið á Sam. Men suður eftir aftur mundi helst vera nakað ótýdligt hjá fleiri, tí tær 48 súkklurnar dundraðu og brølaðu seg gjøgnum ein rættiligan storm.

Alt væl, sms’aðu nøkur. Og alt gekk væl.

Tey høvdu prógvað og staðfest, at Føroyar eru millum heimsins bestu motorsúkklulond at koyra í. Eru vinnumøguleikarnir sum er smáir í útoyggj, so eru vánirnar og útlitini fyri einari blómandi turistvinnu her.

Syrgiligt at so nógv hús standa tóm. Hugaligt at fylt



*Eirikur Ólason Simonsen (vm), formaður í felagnum Føroya Ellisakførum, skipaði fyri túrinum til Trøllanes*

tey við Bed & Breakfastgestum og so annars góðtikið, at hóast ikki øll fremmandafólk brúka PIN-kodu, tá ið tey skulu gjalda við VISA-korti, átti at verðið laga so til, at tey fingu borgað við síni undirskrift.

PIN-koda er ikki til í gjaldskorthøpi nógvastaðni í stóru verð ...